# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Fyri 50 árum síðan:

## Kongavitjan í Vestmanna



*Kort yvir verkætlanina hanga upp á síðuni á einum í vørubili. Á myndini eru limir í SEV-stýrinum. Maðurin í sólbrillum er Hjalgrím Winther, stjóri í SEV, og høgru megin hann er Gunnar Dahl Olsen, formaður í stýrinum*

Myndirnar eru tiknar í sambandi við eina kongavitjan í 1959. Fríðrikur kongur og Ingrid drotning saman við prinsessunum Margrethu og Benadiktu vitjaðu uppi við byrgingarnar oman fyri Vestamanna, meðan verkætlanin Mýrarnar og Heygaverkið varð gjørd. Páll Mikkelsen verkfrøðingur hjá SEV hevur tikið myndirnar.

Um onkur hevur okkurt at viðmerkja í sambandi við hesar myndir, er viðkomandi vælkomin at senda ein teldupost til: maggi@sosialurin.fo



*Bilarnir á myndunum eru m.a. Opel Rekord og Morris Oxford*





*Fríðrikur kongur og prinsessurnar Margretha og Benadikta*

†

### Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Charlottu Djurhuus, Porkeri, vanliga nevnd Lotta**, fer úr kapellinum á Suðuroyar sjúkrahúsi hósdagin kl. 18.00. Jarðarferðin verður úr Betania í Porkeri fríggjadagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Lottu, kunnu lata Zarepta eina peningagávu, konti í peningastovnunum.

**Jákup Thorsteinsson, dr.phil.**, verður jarðfestur leygardagin 28. novembur kl. 14.30 í Sundby Kirke á Amager, Keypmannahavn. Børnini koma heim til Føroya við urnuni seinni.

## MERKISDAGAR

**80 ára føðingardagur**
Hósdagin 26. nov. verður Jana Poulsen, vanliga nevnd Jana í Garði, Strendur, 80 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini Maritu á Fríðufløtum 2, frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**90 ára føðingardagur**
Mikudagin 25. nov. verður Fredrik Jacobsen, Klaksvík, 90 ár. Dagurin verður hildin á Klaksvíkar Sjómansskúla, Garðavegur 11, leygardagin 28. nov. frá kl. 16.

**Silvurbrúdleyp**
Sunnudagin 18. okt. høvdu Birgit og Hanus Hansen, klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 12. des. kl. 19 í Badmintonhøllini í klaksvík. Tey sum ynskja at gleðast saman við silvurbrúðarparinum, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 227479 ella 455592. Ella við at skriva til: bsh@post.olivant.fo áðrenn 3. des.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 29. des. halda við bæði, Pálin og Henry Olsen, Rituvík okkara silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin við veitslu í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tit, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 219134 (Henry) ella 223534 (Pálin). Til ber eisini at senda ein teldupost: henry-o@olivant.fo ella palin.olsen@skulin.fo áðrenn 15. desember.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 5. des. kunnu hjúnini Edith og Páll Klettskarð, í Haraldssundi, halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Haraldssundi í millum kl. 12 og 17. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum, eru hjartaliga vælkomin.

**Diamantbrúðleyp**
Fríggjadagin 4. des. hava Kirsten og Daniel Næs, Hvalba, diamantbrúðleyp. Tey, sum vilja heilsa uppa diamantbrúðarparið eru vælkomin hjá Monu og Eliesar, Toftavegur 15, frá kl. 14-19.

**Diamantbrúðleyp**
Fríggjadagin 27. nov. hava Anna og Jákup Kass, Strendur, diamantbrúðleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 28. nov., saman við familjuni.

**Diamantbrúðleyp**
Mánadagin 30. nov. hava Paula og Peter F. Christiansen verið gift í 60 ár. Dagurin verður hildin 29. saman við børnunum á Jagtvej 213, 7-4, 2100 København Ø.

**Brúdleyp**
Fríggjadagin 4. des. kl. 10 giftast í Sørvágs kirkju, Tórgun Jørleifsdóttur úr Sørvági og Hans Petur Lamhauge av Skála. Dagurin verður hildin í missiónshúsinum Libanon í Sørvági frá 13-17, har øll eru hjartaliga vælkomin.

### Dagurin

26. november. Konrad, deyður ár 975. Týskur fúrstasonur, sum seinni bæði gjørdist dómpróstur og biskupur. Hann læt byggja bæði kirkjur og sjúkrahús og kleystur. Varð skýrdur halgimenni í 1123. Konrad er týskt navn og kemur upprunaliga av einum orði sum merkir hin ráðatøkni.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*